# Føroyskar bókmentir út úr fongslinum



*Vit mugu ikki billa okkum inn, at áhugin fyri føroyskum bókmentum uttanlands kemur av sær sjálvum, sigur formaðurin í Rithøvundafelagnum, Arnbjørn Dalsgarð*



*Føroyskar bókmentir hava avgjørt nógv at bjóða, tá tað ræður um at marknaðarføra ella branda Føroyar úteftir, sigur Elin Heinesen, stjóri á SamVit*

**Vit síggja tað avgjørt sum okkara skyldu at gera føroyskar bøkur meir sjónligar úti í heimi, staðfestir formaðurin í Rithøvundafelganum, Arnbjørn Dalsgarð**

TÝÐING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Meðan tað almenna í okkara grannalondum hevur skapað karmar fyri marknaðarføring av sínum bókmentum, hava almennu Føroyar higartil ikki sæð tað sum sína uppgávu at kunna um føroyskar bókmentir úti í heimi.

- Av somu orsøk smíðar politiski mynduleikin upp ein múr, eitt slag av fangilsi fyri føroyskan skaldskap. Fólk uttan fyri Føroyar vita at kalla ikki, at tað verða skrivaðir tekstir í hesum landinum í dag.

So avgjørdur var táverandi løgtingsmaður, Torbjørn Jacobsen, tá Tjóveldi í fjør setti fram uppskot um at skipa ein týðaragrunn. Politiski viljin treyt heldur ikki, tá uppskotið varð einmælt samtykt, og 600.000 krónur vóru settar av til endamálið.

Um somu tíð frættist, at Norðurlandaráðið heldur fram at stuðla týðingum av bókmentum í smáu máløkjunum í fyribils trý ár.

## Arbeiða við átaki

Við økta peningini, sum sostatt er tøkur til týðingar, kann tað undra, at støðugt fleiri føroysk bókafólk gera vart við, at føroyskar bøkur framvegis stórt sæð eru ósjónligar úti í heimi.

Formaðurin í Rithøvundafelagnum, Arnbjørn Dalsgarð, minnir á, at tøkur peningur ikki í sær sjálvum tryggjar, at føroyskar bøkur verða týddar til onnur mál. Hann vísir á, at fyrsta treytin fyri at føroyskar bøkur verða týddar er, at útlendskir týðarar vita av, at føroyskar bøkur eru til, og at tað ber til at søkja týðarastuðul úr Føroyum.

- Sum er, er tað ómetaliga torført hjá útlendingum at fylgja við í, hvat kemur út á føroyskum og nærum ógjørligt hjá týðarum og forløgum at gera sær eina mynd av, um ein føroysk bók møguliga er verd at týða, sigur Arnbjørn Dalsgarð.

Hann leggur afturat, at um ikki bókin er í uppskoti til Bókmentavirðsløn Norðurlandráðsins, er tað í flestu førum rættiliga tilvildarligt, um ein føroysk bók verður týdd til eitt annað norðurlendskt mál. Í flestu førum er tað høvundurin sjálvur, sum av sínum eintingum leggur stóra orku í at fáa sína bók týdda – eitt arbeiði, sum kann vera sera tungt, um tú ikki hevur eitt apparat aftanfyri teg.

- Tí mugu vit, sum eitt tað fyrsta skipa ein pall, ið bæði skal kunna um føroyskar bøkur og helst eisini bjóða fram ein týddan samadrátt av teimum, tí vit mugu ikki billa okkum inn, at áhugin fyri føroyskum bókum kemur av sær sjálvum. Ongin ivi er um, at bólturin nú liggur hjá okkum, og Rithøvundafelagið sær tað avgjørt eisini sum sína skyldu at átaka sær hesa uppgávuna, sigur formaðurin í Rithøvundafelagnum.

Tí arbeiðir nevndin í Rithøvundafelagnum eisini í løtuni við einum átaki, ið skal marknaðarføra føroyskar bókmentir úti í heimi. Endaliga fíggingin av átakinum er tó ikki komin uppá pláss, og tí kann Arnbjørn Dalsgarð ikki siga, hvussu umfatandi verkætlanin verður. Kortini hevur hann góðar vónir.

- Okkara politikarar hava verið við til at seta stuðulsskipaninar til týðingar í verk. Tí má man ganga út